FØROYA

# POLITI

## Strategi

2023 - 2024

**FØROYA POLITI**

Húsagøta 3
100 Tórshavn
Telefon.: 31 14 48
Email: politi@politi.fo
www.politi.fo




*Politistøðin var bygd í 2021*

# INNIHALD

STRATEGI 2023 – 2024 .......... 4

TILGONGDIN .......... 5

SKYNSAMUR RAKSTUR .......... 7

NÆRRI BORGARANUM .......... 6

STRATEGIIN Í VERKI .......... 8

POLITIIÐ .......... 9

ÁKÆRUVALDIÐ .......... 10

FYRISITINGIN .......... 11

# STRATEGI 2023 – 2024

## POLITIIÐ - EIN TÆASTUVEITANDI STOVNUR Í FØROYSKA SAMFELAGNUM

Eftir nøkur ófriðarlig ár við farsótt og stórum tillagingum í samfelagnum er tíðin komin at líta frameftir og seta mál fyri, hvussu Føroya Politi skal virka í samfelagnum.

Lat meg nevna beinanvegin, at ein tíðaravmarkað strategi til 2023 – 2024 ikki er eitt tekin um, at vit í Føroya Politi regluliga fara at enduruppfinna okkum sjálv, tá ið strategiin gongur út. Í veruleikanum skulu strategiir gerast á slíkan hátt, at tær eru haldførar og seta nøkur haldgóð mál, sum eru viðkomandi í longri tíðarskeið. Hinvegin liva vit í einum umskiftiligum samfelag upp á gott og ónt, og ein árlig skoðan af strategiini skal tryggja, at strategiin er í tráð við tíðina og samfelagið.

Strategiin hjá Føroya Politi tekur støði í yvirskipaðu strategiini hjá samlaða politinum og ákæruvaldinum.

Vit hava tveir høvuðsvarðar í okkara strategi, sum vit hava sett upp sambært yvirskipaðu strategiini fyri alt politiið. Tveir høvuðsvarðar sum byggja á greið politisk ynski:

- Nærri borgaranum
- Skynsamur rakstur

Hesir varðar eru valdir við tí í huga, at uppgávan hjá politinum sum meginregla er at veita tænastur til borgararnar á nógvum ymiskum mótum. Hetta gera vit best, um vit eru nær borgaranum; men eisini tá ið vit skapa so góðar karmar sum gjørligt fyri okkara arbeiði. Okkara strategisku mál røkka bæði út í samfelagið og inn á stovnin sjálvan.

Vit í Føroya Politi gleða okkum at arbeiða við strategiini og at vera við til at tryggja, at Føroyar eru eitt gott og trygt stað at liva.



**Michael Boolsen, fúti**

# TILGONGDIN

## HVUSSU ER STRATEGIIN GJØRD?

Ovasta leiðsla í Føroya Politi hevur við støði í samlaðu strategiini fyri politiið sett upp teir báðar høvuðsvarðarnar: nærri borgaranum og skynsamur rakstur.

Við støði í hesum báðum høvuðsvarðunum og einum karmi fyri tilgongdina eru starvsfólkini í Føroya Politi tikin við í strategitilgongdina gjøgnum teirra leiðarar. Ynskið hevur verið at skapa ein strategiskan karm, sum livir í Føroya Politi – ein strategiskan karm, sum starvsfólkini sjálv hava havt ávirkan á.

Í hesi tilgond eru staðbundnar strategiir gjørdar á teim ymisku deildinum í Føroya Politi, sum lutvíst eru partur av yvirskipaðu strategiini hjá Føroya Politi og lutvíst hava verið við til at velja út málini undir báðum høvuðsvarðunum.

Henda strategiin og strategiirnar á deildunum eru livandi skjøl. Henda stórar broytingar í samfelagnum, broytast brotsverkini munandi og so framvegis, skulu strategiirnar lagast til nýggju umstøðurnar. Fyri at tryggja hetta fer Føroya Politi frá 2025 at gera árligar strategiir; strategiir sum ikki neyðturviliga broyta tað strategiska útgangsstøðið, men sum tryggja, at strategiin fer í gjøgnum eitt árligt tænastueftirlit.

## Strategiskir varðar

### NÆRRI BORGARANUM

- Gjøgnumskygni
- Opinleiki
- Virkin í okkara samskifti

### SKYNSAMUR RAKSTUR

- Rættar avgerðir í rættari tíð
- Nýtsla av røttum amboðum
- Trivnaður

# SKYNSAMUR RAKSTUR

## VIT TRYGGJA GÓÐAR ARBEIÐSUMSTØÐUR, SOLEIÐIS AT BORGARAR VERÐA MØTTIR VIÐ HØGUM YRKISDUGNA-SKAPI OG GÓÐARI OG STUNDISLIGARI TÆNASTU

### RÆTTAR AVGERÐIR Í RÆTTARI TÍÐ

Borgarar og samfelagið sum heild ynskja bæði rættar og skjótar avgerðir. Ein andsøgn kann vera millum rættar og skjótar avgerðir, og tí kalla vit tað í staðin avgerðir í rættari tíð. Vit miðja eftir at skapa røttu javnvágina millum rættar og stundisligar avgerðir, soleiðis at borgarar og samfelag verða møtt við góðari tænastu. Skulu vit liva upp til hetta mál, skulu vit skapa teir røttu karmarnar fyri starvsfólkini.

### NÝTSLA AV RØTTUM AMBOÐUM

Við røttu amboðunum kunnu vit gera arbeiðsgongdir einfaldari. Hetta kann loysa orku og evni til at tryggja rætta og stundisliga viðgerð av ynskjunum hjá borgarum og samfelag til politi og ákæruvald. Vit fara tí at verða opin fyri og stremba eftir at seta í verk amboð, sum kunnu gera okkara arbeiðsgongdir einfaldari til gagns fyri borgarar og tryggja høga góðsku í málsviðgerðini.

### TRIVNAÐUR

Starvsfólk, sum trívast, er eitt mál í sjálvum sær. Vit skulu tó eisini hava í huga, at starvsfólk, sum trívast, eru arbeiðssamari. Arbeiðið við at tryggja trivnað er sostatt av fleiri góðum orsøkum eitt týdningarmikið strategiskt mál í sær sjálvum. Vit vilja tí arbeiða strategiskt við at tryggja karmar, sum skapa trivnað fyri starvsfólkini. Hetta arbeiðið fer eyðvitað at leggja dent á bæði teir evnisligu, kropsligu og sálarligu karmarnar fyri arbeiðið.

# NÆRRI BORGARANUM

## VIT HAVA HØGAN YRKISDUGNASKAB OG VIT VILJA VERA EIN VIRKIN PARTUR AV FØROYSKA SAMFELAGNUM

### GJØGNUMSKYGNI

Álitið hjá borgarunum økist, og borgarar skilja fyrst og fremst uppgávurnar hjá politinum, um teir hava innlit í arbeiðið hjá politinum og harvið fáa eina fatan av hesum arbeiði. Henda fatanin og hetta álitið eru grundarsteinar undir at viðurkenna arbeiðið hjá politinum. Vit fara tí – við teimum avmarkingum, sum eru – at arbeiða fyri at skapa so stórt gjøgnumskygni sum gjørligt viðvíkjandi arbeiðinum hjá politinum og ákæru-valdinum.

### OPINLEIKI

Fyri at skapa gjøgnumskygni fara vit at vera so opin sum møguligt. Vit fara at samskifta um arbeiðið hjá politinum og ákæruvaldinum og eggja øðrum í samfelagnum til at fáa innlit í, hvat vit megna, og hvat vit vilja. Vit vilja vera til taks, og vit vilja svara teimum spurningum, sum vit kunnu. Vit lata so nógv upp, sum ráðiligt er.

### VIRKIN Í OKKARA SAMSKIFTI

Vit vilja vera virkin í okkara samskifti, sum skal vera greitt og skilligt. Gjøgnum hetta samskiftið vilja vit vera við til at skapa fortreytirnar fyri gjøgnumskygni, opinleika og fólkaræðisligum innliti í arbeiðið hjá politinum. Vit vilja verða virkin í okkara ítøkiliga samskifti við einstaka borgaran og yvirskipað gjøgnum fjølmiðlar og sosialar miðlar. Tað er týdningarmikið fyri okkum, at okkara samskifti er í eygnahædd við borgaran og er lætt at skilja.

# STRATEGIIN Í VERKI

## HVAT VILJA VIT Í EINSTØKU SÚLUNUM OG DEILDUNUM?

Føroya Politi er eins og onnur politiøki í danska ríkinum býtt í tríggjar súlur:




Politiið er skipað í tilbúgving, undir hesum hoyrir eisini fyribyrging, hundapatrulja og ferðsla, kanningardeild og skipanardeild. Fyrisitingin er skipað í leiðsluskrivstovu, starvsfólkadeild, fíggjardeild, sum eisini fevnir um útgerðarsamskipan, og borgaratænastu. Fyrisitingin hevur harafturat starvsfólkaábyrgd av starvsfólkum, sum røkja uppgávur fyri føroyskar myndugleikar, sýslumenn og parkeringarvørðar.

Politiøkini í norðara og sunnara parti av landinum fevna bæði um uppgávur í politi- og fyrisitingarsúluni.

Hvussu strategiin verður framd í verki í súlum og deildum, kanst tú lesa nærri um eftir hetta.

# POLITIIÐ

## VIT VERJA BORGARARNAR OG BRYNJA OKKUM TIL VERJA BORGARARNAR Í FRAMTÍÐINI

'*Vit skapa tryggleika.*' Hetta er felags visjónin hjá politinum og ákæruvaldinum.

Við støði í hesi felags visjónini er tað upplagt at leggja dent á tryggleika og trygd, tá ið strategiin hjá politisúluni skal setast í verk.

Tað er eyðvitað, at vit, í hesi tilgongd, ikki bert virka í mun til ta støðu, sum vit kenna okkum aftur í, men eisini savna inn vitan, soleiðis at vit kunnu fyrireika okkum upp á avbjóðingar, sum koma.

Tað er týdningarmikið fyri okkum, at vit, í hesi tilgongd, eru tilvitað um øll viðurskifti, sum skapa ótryggleika og óvissu hjá borgarunum.

Vit eru varug við, at vit skapa tryggleika við at vera sjónlig, men vit eru eisini varug við, at tryggleiki kann røkkast á annan hátt.

### NÆRRI BORGARANUM

Vit vilja møta borgarunum í eygnahædd. Vit vilja vera har, sum borgararnir eru, og har sum teir hava brúk fyri okkum.

Tryggleiki byggir í stóran mun á tilvitanina um, at brotsgerðir ikki vera framdar – ella at tær í øllum førum kunnu fyribyrgjast. Tí vilja vit styrkja fyribyrgingina av brotsverkum og samstarva við viðkomandi myndugleikar og felagsskapir, sum kunnu vera við til at fyribyrgja brotsverk.

Vit vita, at smærri lógarbrot, t.d. ólóglig koyring á prutli hava týdning fyri tryggleikakensluna hjá borgaranum, og vit mugu virka í samsvari við hesa vitan.

Vit eru til staðar fyri allar borgarar, og vit gera ikki ógrundaðan mun á borgarum. Vit taka serligt atlit til veikastu borgararnar og vilja saman við øðrum viðkomandi myndugleikum og felagsskapum hjálpa og stuðla teimum.

Vit fylgja gongdini í brotsverkum, sum vera framd og skipa okkara fyribyrgjandi og tryggleikaskapandi átøk í samsvari til hetta. Vit fara m.a. at styrkja okkara arbeiði móti brotsverkum á netinum.

Vit fara eisini at arbeiða víðari við at seta í verk VALA-ætlanina (Velkomst, Afklaring, Løsning, Afslutning) við atliti til ta góðu samrøðuna.



*Talgilt koyrikort tikið í nýtslu í 2023*

### SKYNSAMUR RAKSTUR

Vit arbeiða við at tryggja skynsamar og tryggar málsgongdir, soleiðis at mál hjá borgarum ikki draga óneyðugt út. Í hesum sambandi halda vit regluligar fundir við viðkomandi samstarvsfelagar, sum eisini kunnu virka til smidligar málsgongdir.

Vit tryggja, at vit hava røttu førleikarnar til uppgávurnar, sum vit skulu útinna – og at teir røttu førleikarnir verða nýttir til viðkomandi uppgávur.

Vit siga frá, tá ið vit verða varug við óskynsemi, og vit skjóta upp loysnir á óskynsamar málsgongdir við tí fyri eyga alsamt at góðska okkara arbeiði.

# ÁKÆRUVALDIÐ

## VIT ARBEIÐA FYRI RÆTTVÍSI

Rættvísi er ein týdningarmikil partur av at skapa tryggleika fyri borgararnar.

Rættvísi er tó ikki eintýtt. Tað, sum ein borgari sær sum ein rættvísa avgerð, kann av einum øðrum borgara síggjast sum órættvísi.

Tí er tað týdningarmikið, at vit tryggja høga góðsku, og at vit arbeiða skynsamt og uttanveltað.

Kjarnuvirðini hjá ákæruvaldinum at vera *rættvís, ordilig, týðilig og eldhugað* hava eisini ein eyðsæddan leiklut í arbeiðinum hjá ákæruvaldinum.

### NÆRRI BORGARANUM

Tað er týdningarmikið, at borgarin merkir, at hann livir í einum tryggum og rættvísum samfelag.

Tí er tað týdningarmikið, at ákæruvaldið er sjónligt, og at opinleiki eyðkennir arbeiðið hjá ákæruvaldinum. Vit fara tí í enn størri mun at kunna og samskifta týðiliga um okkara virksemi.

Tað er týdningarmikið, tá ið vit møta borgaranum í ítøkiligum málum, at tað stendur borgaranum greitt, at vit eru uttanveltað, og at vit tryggja, at borgarin skilur tað, sum gongur fyri seg. Vit fara tí framhaldandi at arbeiða við at vera týðilig í okkara miðling. Tað skal tryggja, at allir borgarar merkja, at teir fáa eina góða og virðiliga viðferð.

### SKYNSAMUR RAKSTUR

Vit arbeiða við at betra tær mannagongdir, sum tryggja, at røttu málini verða raðfest, og at tær røttu avgerðirnar verða tiknar í rættari tíð. Vit stremba eftir at stytta málsviðgerðartíðirnar og at lúka sett málsviðgerðarmál.

Við at hava serligt atlit at einum breiðum førleikagrundarlagi virka vit til, at politiøkið verður so sjálvberandi sum møguligt. Í einum ferðmiklum gerandisdegi leggja vit dent á at betra um trivnaðin hjá okkara eldhugaðu starvsfólkum, millum annað við nærverandi leiðslu.



*Ein ákæri í Føroya Rætti*

# FYRISITINGIN

## VIT VÍSA YRKISDUGNASKAP, HJÁLPA, MENNA OG VEITA GÓÐA TÆNASTU

Fyrisitingin í Føroya Politi hevur væl meira beinleiðis samband við borgararnar enn fyrisitingin í einum donskum politiøki. Hetta setur krøv til tænastuna, sum vit veita úteftir.

Fyrisitingin hjálpir og stuðlar undir virksemið í hinum súlunum og er snúningsdepilin í politiøkinum.

Innanhýsis vil fyrisitingin vera við til at tryggja, at politiøkið verður rikið á lýtaleysan, fíggjarliga ráðiligan og starvsfólkavinarligan hátt.

Fyrisitingin skipar samskiftisarbeiðið hjá politiøkinum og virkar til at tryggja gott samskifti við borgararnar.

Uttanhýsis vil fyrisitingin vera við til at tryggja, at borgarar verða møttir við virðing, yrkisdugnaskapi, tænastu og blíðskapi og stuðlar somuleiðis undir, at áheitanir frá borgarum verða avgreiddar so skjótt sum møguligt.

### NÆRRI BORGARANUM

Vit stuðla yvirskipaða málinum hjá politiøkinum um at vera eitt sera gjøgnumskygt politiøki. Vit vilja í tí sambandi veita viðkomandi og rættstundis samskifti um arbeiðið í politiøkinum bæði yvirskipað og ítøkiliga.

Vit arbeiða fyri, at okkara arbeiðsgongdir gerast so smidligar og einfaldar sum møguligt, soleiðis at vit kunnu veita borgarunum teirra tænastu so skjótt og einfalt sum møguligt, og soleiðis at vit samstundis kunnu brúka orku til at stuðla undir og menna arbeiðið í fyrisitingini annars.

Vit fara eisini at arbeiða víðari við at seta í verk VALA-ætlanina (Velkomst, Afklaring, Løsning, Afslutning) við atliti til ta góðu samrøðuna.

### SKYNSAMUR RAKSTUR

Greið og samanhangandi leiðsla er ein týðandi lutur í trivnaðinum hjá starvsfólkunum. Vit arbeiða tí miðvíst víðari við menningini av leiðslubólkinum í politiøkinum.

Vit miðja ímóti einum so breiðum starvsfólkahópi sum møguligt, soleiðis at vit fáa eina so breiða førleikamongd sum møguligt.

Vit vilja arbeiða miðvíst við at gera fyrisitingarligu arbeiðsgongdirnar í politiøkinum smidiligar, sjálvirknar og nútímans, soleiðis at vit lata orku leysa at tryggja skynsamar arbeiðsgongdir, sum geva meining.



*Í Borgaratænastuni taka tey væl ímóti tær*

FØROYA POLITI

Húsagøta 3 I 100 Tórshavn I Telefon.: 31 14 48 I Email: politi@politi.fo I www.politi.fo